# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein




## WALL STREET MONEY NEVER SLEEPS

Hósdagin 30. september hevði filmurin Wall Street Money Never Sleeps frumframsýning. Talan er um ein tvey'ara til filmin Wall Street, sum kom út fyri 23 árum síðani. Aftur hesuferð er tað Michael Douglas, sum hevur høvuðsleiklutin sum fíggjarmaðurin Gordon Gekko, og hesin filmurin byrjar, har fyrri filmurin endaði, nevniliga í fongslinum. Tað er trýfaldi oscarvinnarin, Oliver Stone, sum filmsstjórnar.

**HAVNAR BIO**
Frumsýning 29. september
www.bio.fo



## LOYNIDÓMURIN HANDAN BEATLES

Mikudagin 6. oktober fara Stanley Samuelsen og Per Wium, tónleikari og fyrrverandi redaktiónschefur á DR, at hava konsertfyrilestur um The Beatles.
Per Wium fer at greiða frá um bólkin og spælir á klaver, meðan Stanley Samuelsen syngur og spælir guitar. Teir leiða áhoyraran frá fyrstu innspælingunum í 1963 og inntil alt endaði í 1970. Um vokalirnar, tónleikaligu menningina, samstarvið millum Lennon og McCarty, um leiklutin hjá Harrison og meiri. Av sangum verða til dømis P.s. I love you, I'll be back, I'm a looser, Hey Jude og Long and winding road.
Tiltakið er sera vælumtókt í Danmark, og showið sigst vera flott og gott. Teir báðir hava eisini latið eina bók úr hondum, nevnd "Beatles for alle", sum kom út fyrr í ár.

**KONSERTFYRILESTUR**
mikukvøldið 6. oktober kl 19. Kostnaður 100 kr



## EVNISDAGUR UM FJALDU SORGINA VIÐ FOSTURTØKU

Leygardagin 2. oktober hevur Føroya ProVita evnisdag um fjaldu sorgina eftir eina fosturtøku. Hetta er ein dagur, sum skuldi verið fyrr í ár, men orsakað av tarnaðu flogferðsluni í vár, var dagurin útsettur. Røðari verður Bernardette Goulding, ið starvast hjá felagsskapinum Rachel´s Vineyard í Írlandi. Hon fekk sjálv fosturtøku framda og fer at tosa um sorgina og skommina eftir eina fosturtøku.

**EVNISDAGUR**
um fjaldu sorgina eftir fosturtøku á Hotel Hafnia leygardagin 2. oktober
frá kl 13-16 á Panorama
á Hotel Hafnia.
www.provita.fo

## WHISKYSMAKKING VIÐ EINMALT

Fríggjakvøldið 1. oktober hevur whisky-felagið EinMalt sermerkta smakking. Evnið verður whisky framleitt í 60 árunum, og skráin fevnir um 5 ymisk sløg av whisky. Kostnaðurin er 700 kr, millum annað tí, at sløgini, ið smakkað verða, kosta millum 2000 og 8000 kr fløskuna.



**WHISKYSMAKKING**
fríggjakvøldið
1. oktober kl 20
í Hornahúsinum í Havn
www.whisky.fo

## KVINNUKVØLD Í VESTMANNA

Fríggjakvøldið 1. oktober verður Bryggjan í Vestmanna karmur um eitt stórt kvinnukvøld fyri allar føroyskar kvinnur. Góð ráð eru at fáa frá einum føroyskum stylecoachi, sum fer at tosa um kropsbygnað og klædnaval, og einum sjúkrarøktarfrøðingi, sum fer at tosa um Restylane. Ein sexologur tosar um parlag og kynslív, eins og ein spennandi heimsíða fer at sýna fram lutir, ið oftast liggja við seingjarkantin. Fá góð ráð til jólagávuna til mannin, hoyr livandi tónleik, fá make over o.a. Aldursmark er 18 ár.

**KVINNUKVØLD**
á bryggjuni í Vestmanna 1. oktober kl. 20-23. Kostnaður 250 kr
og aldursmarkið er 18 ár.
Leita eftir bólkinum »fokus á kvinnuna« á facebook.





## 2. PARTUR AV NÝGGJU RØÐINI »BORGEN«

Seinasta sunnukvøld var fyrsti partur av nýggju røðini hjá DR, Borgen, send á svf. Røðin er í 10 pørtum, og fyrsti partur fekk heilt hampulig ummæli. Eisini politikarar á Christiansborg skýrdu sendingina sum verandi realistiska og spennandi. Tað er sjónvarpsskokkurin og filmsmaðurin, Adam Price, sum hevur stjórnað nýggju røðini, sum longu frá fyrsta parti hevur lagt upp til spenning, rok og intriger.

**2. PARTUR**
av »Borgen« sunnukvøldið á svf
www.krf.fo



## ARNOLD VEGGHAMAR Í LISTASKÁLANUM

Inntil 24. oktober verður framsýning við Arnold Vegghamar í listaskálanum. Talan er um gamlar og nýggjar málningar.

**LISTASKÁLIN**
til 24. oktober 2010, framsýning við Arnoldi Vegghamar
www.art.fo